Søljan-Tjaldur 35-18 (18-9):

# Nicoleta var munurin

**Hesaferð fekk rumenska snarljósið 17 mál, tá Tjaldur varð sent heim við ongum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sunnudagin vitjaði Tjaldur í høllini á Giljanesi, og her staðfesti Søljan enn einaferð, at tær veruliga stíla høgt í ár.

Ikki minst hevur tað higartil ligið sera væl fyri hjá kviku Nicoletu R. Hansen, og aftur hesa ferð var hon leikarin, sum gjørdi størsta hálið.

Kviki rumenin skeyt ikki færri enn 17 mál í dystinum, og tað vil siga, at hon fyri triðju ferð í ár setti seg á listan yvir leikarar, sum hava skotið 15 mál ella fleiri í sama dysti. Í útidystinum móti Tjaldri skeyt hon somuleiðis 17 mál, og móti Kyndli á útivølli varð talan um ikki færri enn 18 mál.

Og sum vera man, so var talan um lítlan og ongan spenning í dystinum. Sær sjálvum so líkt, so legði Søljan stóran dent á verjupartin, fyri síðani at senda kvik mótálop avstað, og hesum hevði Tjaldur einki vápn ímóti.

Sum dysturin leið, so var spurningurin bert, hvussu nógv mál skuldu vera á muni, og hvussu nógv av hesum Nicoleta skuldi standa fyri. Svarið gjørdist í báðum førum 17.


*Hóast kappingin enn ikki er hálvrunnin, so tykist Nicoleta R. Hansen væl ávegis til eina endastøðu sum besti málskjúttin í landinum í ár*

## FAKTA UM DYSTIN

**Søljan-Tjaldur 35-18 (18-9)**
**Málskjúttar**
**Søljan:** Nicoleta Radu Hansen 17(1), Heidi Maria Akselsen 8, Lina Andriulyte 6(3), Hertha Jónsdóttir Simonsen 2, Fía Selma Nielsen 1, Kristianna Petersen 1
**Tjaldur:** Vesna Tomajek 7(2), Heidi Heinesen 3, Anna Hansen 3, Mona Langgaard 2, Anni Højgaard 1, Kirstin Jacobsen 1, Kristine Ellingsgaard 1
**Brotskøst:** Søljan 5, Tjaldur 5
**Útvísingar:** Søljan 2, Tjaldur 3
**Dómarar:** Birgir Sondum & Gunnar Gregoriussen

**Flest mál í einum dysti**
**18 mál**

| Ár | Leikari | Lið | Dystur |
|---|---|---|---|
| 2004/05 | Ioana Rápa | VÍF | Kyndil-VÍF |
| 2004/05 | Nicoleta Radu Hansen | Søljan | Kyndil-Søljan |

**17 mál**

| Ár | Leikari | Lið | Dystur |
|---|---|---|---|
| 2004/05 | Nicoleta Radu Hansen | Søljan | Søljan-Tjaldur |
| 2004/05 | Nicoleta Radu Hansen | Søljan | Tjaldur-Søljan |
| 2002/03 | Áki Mørk | Neistin | KÍF-Neistin |
| 1999/00 | Áki Olsen | Neistin | Neistin-Tjaldur |

**16 mál**

| Ár | Leikari | Lið | Dystur |
|---|---|---|---|
| 2003/04 | Simona Petersen | Neistin | Neistin-VÍF |
| 2001/02 | Gabrielle Fekete | VB | StÍF-VB |
| 2001/02 | Simona Petersen | Søljan | Søljan-Stjørnan |
| 2001/02 | Heini Hanusarson | Neistin | Neistin-H71 |

**15 mál**

| Ár | Leikari | Lið | Dystur |
|---|---|---|---|
| 2002/03 | Áki Olsen | VÍF | VÍF-Neistin |
| 2001/02 | Bjarni Wardum | H71 | StÍF-H71 |
| 2001/02 | Heini Hanusarson | Neistin | VÍF-Neistin |
| 2001/02 | Asta Petrauskiene | Søljan | Søljan-Kyndil |
| 2001/02 | Ioana Rápa | VÍF | Søljan-VÍF |
| 2000/01 | Gurið Mortensen | VB | Tjaldur-VB |
| 1999/00 | John Petersen | StÍF | VÍF-StÍF |

StÍF-Neistin 28-31 (17-15):

# So bragdaði hjá Neistanum

**Damir Oros var stóri spælarin – og bara spælari – tá tað sunnudagin aftur eydnaðist Neistanum at fáa stig**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað tykist hava gjørt góðan mun hjá Neistanum, at teir í vikuni framdu broytingar í stabinum kring besta mansliðið. Her hevur Damir Oros higartil í ár verið spælandi venjari, men tað hevur verið sjónligt, at hetta ikki er ein leilutur, sum hann hevur trivist nakað serliga væl í.

Sunnudagin var tað so aftur sum spælari – og einki annað - at Damir skuldi royna seg, og tað tók honum heldur ikki langa tíð at staðfesta, at hetta fór at verða nakað heilt annað.

Saman við einum væl spælandi Ólavi Brimnes syrgdu Oros at kalla einsamallur fyri, at Neistin helt stutt tjóður á StÍF, og spakuliga kom nakað, sum líktist einum vinnarahugburði fram á liðnum.

StÍF hevði tó leiðsluna, tá farið varð til hálvleiks, men størsta partin av seinna hálvleiki var munurin millum lítil og eingin. Seinastu seks-sjey minuttirnar eydnaðist tó gestunum at sleppa avstað. Heimamenninir royndu at svara aftur, men tað stóð púra fast, og so kundu teir bláu fyri bara triðju ferð í ár fegnast um ein sigur.

Og soleiðis sum kappingin er skipað, so er als ikki víst, at teir bláu fara at standa tómhentir, tá árið endar. Eftir at stigini eru hálverað, eru tað nevnliga bara tvey stig upp til H71 á bronsuplássinum. Tann munurin er eisini tann sami hjá StÍF, so hóast teir í ár hava meldað greitt út, at nú verður talan ikki um at styrkja liðið við útlendskum kanónum, so er fundamentið at byggja víðari á sera gott.

## FAKTA UM DYSTIN

**StÍF-Neistin 28-31 (17-15)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Alexandur Johansen 13(4), Leivur Justinussen 4, Sveinur Justinussen 4, Borgar Danielsen 4, Bent Djurhuus 2, Bárður Danielsen 2
**Neistin:** Damir Oros 13(2), Ólavur Brimnes 6, Áki Mørk 4, Dann Thorleifsson 4, Jón Ludvig 3, Rani Slættanes 1
**Brotskøst:** StÍF 4, Neistin 2
**Útvísingar:** StÍF 2, Neistin 2
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

## FM-liðkappingin - 5. umfar

**Úrslit og støður**
**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| **Klaksvík** | **Havnin** | **1,5-2,5** |
| Eyðun Nolsøe | Martin Poulsen | 0-1 |
| Ólavur Simonsen | Olaf Berg | 0-1 |
| Finnbjørn Vang | Bogi Ziska | 1-0 |
| Rani Nolsøe | Herluf Hansen | 0,5-0,5 |
| **Toftir** | **Kollafjørður** | **0,5-3,5** |
| Wensil Højgaard | Hans Kristian Simonsen | 0-1 |
| Helgi Joensen | Torbjørn Thomsen | 0,5-0,5 |
| Jústinus Hansen | Eyðálvur Johannesen | 0-1 |
| Oddmar Andreasen | Christoffer Dam | 0-1 |
| **Vestmanna** | **Hvalvík** | **1,5-2,5** |
| Carl Eli N. Samuelsen | Rógvi W. Rasmussen | 0,5-0,5 |
| Jákup á Rógvi Andreasen | Finnbj. Zachariassen | 0,5-0,5 |
| Samson Højgaard | Martin Brekká | 0-1 |
| John Jacobsen | Gunnar Joensen | 0,5-0,5 |

**Støðan**

| | |
|---|---|
| 1. Klaksvík | 14,5 |
| 2. Havnin | 13,0 |
| 3. Hvalvík | 10,5 |
| 4. Kollafjørður | 9,5 |
| 5. Vestmanna | 9,0 |
| 6. Toftir | 2,5 |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| **Vestmanna** | **Havnin b** | **3-1** |
| Mogens Nielsen | Súni Jacobsen | 0,5-0,5 |
| Sjúrður Thorsteinsson | Johan E. Hansen | 0,5-0,5 |
| Martin Jóanesarson | Jákup A. av Túvuvølli | 1-0 |
| Rógvi Hansen | Frants J. Eliassen | 1-0 |
| **Klaksvík** | **Kollajørður** | **3,5-0,5** |
| T. M. Anthoniussen | Karl Louis Johansen | 1-0 |
| Ingolf Gaard | Hans Petur Joensen | 0,5-0,5 |
| Rani Baldursson | Virgar Fagraklett | 1-0 |
| Esbern Christiansen | Hávarður Jensen | 1-0 |
| **Havnin a** | **Sandavágur** | **2,5-1,5** |
| Jóhan Gaard | Torkil Nielsen | 0,5-0,5 |
| Andrias Ziska | Bernh. Augustinussen | 0,5-0,5 |
| Jógvan Næs | Jónfinn Thomsen | 1-0 |
| Óli Joensen | Gutti Petersen | 0,5-0,5 |

**Støðan**

| | |
|---|---|
| 1. Klaksvík | 16,0 |
| 2. Havnin a | 13,0 |
| 3. Sandavágur | 13,0 |
| 4. Vestmanna | 6,5 |
| 5. Havnin b | 6,0 |
| 6. Kollafjørður | 4,5 |

3. deild - 6. umfar

| | | |
|---|---|---|
| VT b | ST | 2-2 |
| HT b | TT | 4-0 |
| GT b | Rókur | 1,5-2,5 |
| ET | HT a | 0,5-3,5 |
| VT a | KTF | 3,5-0,5 |

**Støðan**

| | |
|---|---|
| 1. VTa | 18,5 |
| 2. GTa | 17,5 |
| 3. HTb | 17,0 |
| 4. Rókur | 15,0 |
| 5. HTa | 13,5 |
| 6. ST | 11,0 |
| 7. KTF | 9,5 |
| 8. VTb | 5,0 |
| 9. ET | 4,5 |
| 10. TT | 4,0 |
| 11. GTb | 3,5 |